# Almennir stovnar sleppa undan lógini

*Fútin stendur hjálparleysur yvirfyri almennum stovnum, sum bróta lógina. Orsøkin er, at tað er mestsum vónleyst at staðfesta juridisku ábyrgdina fyri lógarbrotinum*




*Lógin er í mongum førum ónýtilig, tí hon staðfestir ikki juridisku ábyrgdina á almennum stovnum ...*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

DÁNJAL HØJGAARD

Almennir stovnar eru meira ella minni friðaðir móti lógini, tá tað kemur skarpskeringar.

Lógin um arbeiðaravernd, sum Arbeiðseftirlitið er sett at umsita, er eitt ítøkiligt dømi.

Arbeiðseftirlitið noyðist við jøvnum millumbili, at melda almennar stovnar til politiið, tí at teir ikki halda lógina um arbeiðaravernd. Men Arbeiðseftirlitið fær málini aftur í høvdið, við teirri grundgeving, at fútin einki fær gjørt, tí at tað ikki ber til at staðfesta juridisku ábyrgdina.

### Fleiri lógir

Men lógin um arbeiðaravernd er einki eindømi.

Tað tykist at vera ein generellur trupulleiki, at fútin í mongum førum ikki fær nortið við almennu stovnarnar, tá tað kemur til stykkis.

– Tað er ein ørgrynna av lógum, har tað sama ger seg galdandi, sigur Jens Severinsen, virkandi fúti.

Hóast hann ikki kennir nakað fordømi frá øðrum stovnum, so heldur Jens Severinsen at trupulleikin hjá Arbeiðseftirlitinum saktans eisini kann koma uppá tal hjá øðrum eftirlitsstovnum - t.d. Brunaumsjón Landsins og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

– Hetta vil gera seg galdandi fyri allar lógir, sum áleggja stovnum nakrar skyldur, sum teir eiga at halda á jøvnum føti við privat arbeiðspláss. Men tíbetur hava ikki verið so nógv mál, burtursæð frá teimum, sum snúgva seg um lógina um arbeiðaraverndar, sigur Severinsen.

### Staðfesting vantar

Sambært virkandi fúta er trupulleikin í tveimum.

Fyri tað fyrsta eru ongar ásetingar í føroysku revsilógini, sum greitt tilskila hvørjum fútin skal fara eftir, um ein almennur stovnur brýtur lógina.

Danska revsilógin varð broytt fyri nøkrum árum síðani, og í henni er juridiska ábyrgdin greitt staðfest. Men hendan broyting er ongantíð komin í gildi í Føroyum.

Harumframt vænta tær einstøku lógirnar í mongum førum eina greiða áseting um hvør ið stendur juridiskt til svars á almennu stovnunum.

– Hetta manglar í báðum førum í Føroyum, sigur virkandi fútin.

– Í Danmark hevur mann tikið avleiðingarnar av, at tað ikki hevur borið til at revsa kommunur og statsstovnar, sigur hann.

*Í brævi 14. august 1997 til Arbeiðseftirlitið vísir fútin á trupulleikan við juridisku ábyrgdini á almennum stovnum. Hetta hevur hann gjørt fleiri ferðir*



Ved min afgørelse har jeg navnlig lagt vægt på, at [illegible] ikke er at anse som arbejdsgiver og at der efter min opfattelse ikke i lov om arbejderbeskyttelse med tilhørende bekendtgørelser er hjemmel til at straffe juridiske personer, f.eks. Landssygehuset, når den juridiske person optræder som arbejdsgiver.

En sådan hjemmel findes f.eks. i den danske arbejdsmiljølov.

Det er min opfattelse, at nærværende sag kunne give anledning til overgivelser om at rette henvendelse til Landsstyret m.h.p. at tilvejebringe det fornødne grundlag til at straffe juridiske personer.

Min afgørelse kan påklages til Rigsadvokaten.

# – Vit gera mismun

*– Vit fáa ikki fatur á almennum stovnum, tá teir ikki fylgja okkara boðum, og tað ger arbeiðið mikið óhugaligt, sigur Eli Davidsen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum. Lógin stovnurin arbeiðir eftir ger mun á privatum og almennum fyritøkum*

SVEINUR TRÓNDARSON



– Vit fáa tíverri ikki gjørt tað øðrvísið, tí arbeiðaraverndarlógin er gjørd soleiðis, at munur er á tá talan er um eina almenna fyritøku og tá talan er um eina almenna fyritøku.

Orðini eigur Eli Davidsen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum, og evni vit tosa um er arbeiðarverndarlógin.

Støðan er nevniliga tann, at Arbeiðseftirlitið hevur skyldu til, at kannað, um arbeiðsviðurskiftini eru, sum tey skulu vera. Hetta gera teir á so at siga øllum arbeiðsplássum, og tað hendir seg meiri enn so, at teir hava okkurt at finnast at.

Í slíkum førum fær arbeiðsgevarin eitt skotbrá, at rætta »brekið«, men fer hann út um freistina verður málið sent fútanum.

Og tað er her munurin millum tær privatu og tær almennu »fyritøkurnar« kemur í.

Tí er talan um ein almennan stovn, ber nevniliga ikki til at plasera ábyrgd.

Hetta er nevniliga niðurstøðan av nøkrum málum, sum Arbeiðseftirlitið hevur sent fútanum.

Í svarið sínum til Arbeiðseftirlitið sigur fútin, at lógin um arbeiðaravernd ikki heimilar at áleggja tí almenna revsiábyrgd, og tí sendur hann eftirlitinum málini aftur.

### Óarbeiðsligt

Eli Davidsen, stjóri á arbeiðseftirlitinum sigur við Sosialin, at tað er sera óhugaligt at arbeiða undir slíkum umstøðum.

– Fyri so vítt kann tað gera tað sama, um vit velja at »fara eftir« einum almennum arbeiðsgevara, tí velur hann at lata vera við at gera eftir okkara boðum, so hendir einki meir, sigur Eli Davidsen.

Hann vísir á, at tað er beint øvugt, tá talan er um ein privatan arbeiðsgevara, tí hann kann fáa bøtur, samsvarandi lógini um arbeiðaravernd, men tað kann tann almenni arbeiðsgevarin ikki.

– Trupulleikin er, at tað stendur einki í lógini um arbeiðaravernd hvør almenni arbeiðsgevarin er og tí ber ikki til at siga, hvør tað er, sum hevur ábyrgdina, sigur Eli Davidsen.

Hann vísir eisini á, at var nýggja lógin um arbeiðsumvørvi sett í gildi, so vóru hesi viðurskiftini fingin upp á pláss.

– Tað lógaruppskotið er visst borið í tingið tríggjar ferðir, men tað er eisini borið útaftur tríggjar ferðir, uttan at nakað er hent, sigur Eli.

### Óheppin støða

Sum tað skilst, so er støðan hjá arbeiðseftirlitinum ikki serliga heppin. Munur verður gjørdur á almennum og privatum arbeiðsgevarum, og tað er í grundini ótolandi.

Og hetta er heldur ikki nakað sjáldsamt fyribrigdið, tí í fjør hevði eftirlitið fimm mál, sum stovnurin fekk sendandi aftur frá fútanum við tí stemplinum, at hann ikki kundi ábyrgda ein almennan stovn.

– Tí gerst hugurin at fara at kanna almennar stovarn alsamt minni, sigur Eli Davidsen og vísir á, at tað ikki kann vera endamálið, at ein almennur stovnur kann snúgva sær undan krøvum, sum privat virkir skulu liva eftir.

Av Fútaskrivstovuni váttar Jens Severinsen, virkandi fúti, støðuna.

– Tað er rætt, at vit einki fáa gjørt. Í Danmark var mann varugur við støðuna og broytti soleiðis, at tað nú ber til at plasera ábyrgd hjá antin stati ella kommunu, men henda broyting er ikki gjørd í Føroyum. Soleiðis sæð fáa vit heldur ikki gjørt nakað fyrr enn politikkararnir broyta lógina, og um teir vilja gera tað vita vit ikki, sigur Severinsen.





*Kristian Magnussen heldur mynduleikarnar vanvirða leiðslurnar á almennum stovnum*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Landsstýrið ørkymlar leiðslurnar

*Kristian Magnussen heldur ikki, at tað ber til hjá leiðslum á almennum stovnum at stýra, tá landsstýrið fyrst gevur ov lága játtan, men síðani traðkar til og útsetir trupulleikan*

JOHN JOHANNESSEN

– Mannagongdin hjá landsstýrinum viðvíkjandi sjúkrahúsmálinum kann als ikki góðtakast.

Kristian Magnussen heldur tað vera heilt burturvið, at landsstýrið virðir leiðslurnar á almennum stovnum so lítið, at tá leiðararnir taka avleiðingarnar av lágu játtanunum og velja tungu byrðuna at seta navn á uppsagnir, kemur landsstýrið brádliga og útsetir trupulleikan, tí hann er vorðin ein politiskur trupulleiki.

### Ov lágar játtanir

– Størsti trupulleikin í málinum um Landssjúkrahúsið er, sum vit øll vita, at tað fær alt ov lítla játtan. Hetta er í veruleikanum nakað, ið er galdandi fyri allar teir tænastustovnar, vit skattgjaldarar hava krav uppá.

Kristian Magnussen vísir á, at vit gjalda høgan skatt fyri at hava eitt gott skúlaverk, gott heilsuverk og gott almannaverk. Men myndugleikarnir ynskja sambært Kristiani Magnussen ikki at játta nóg nógv av skattapenginum til hesar tænastur, og tí er skilið sum tað er.

– Hetta er alt annað enn rætt, tá vit hava eitt stórt yvirskot á fíggjarlógini. Hava vit ikki í dag ráð til at dagføra sjúkrahúsini og veita eina betri sjúkrarøkt, fáa vit tað aldri, sigur javnaðartingmaðurin og vísir á, at trupulleikin við ov lítlari játtan innnan sjúkrahúsverkið ikki bert er galdandi fyri Landssjúkrahúsið, men eisini fyri Suðuroyar Sjúkrahús.

### Virða ikki leiðslurnar

Kristian Magnussen heldur tað vera mannminkandi, at seta leiðslurnar á sjúkrahúsunum í ta støðu, at tær á hvørjum ári skulu seta nøvn á uppsagnir, sum kanska ikki verða framdar hóast alt.

– Leiðslurnar royna alt tær kunnu at fáa tað at bera til at reka sjúkrahúsini innan fíggjarkarmarnar, men tá tær síggja, at tað ikki ber til, mugu tær seta seg við uppsagnarlistanum.

– Tað stendur uttan iva nógv á deildarleiðarunum, ið noyðast at seta seg niður og seta nøvn á eitt ávíst tal av uppsagnum. Men uppaftur verri er tað, tá myndugleikarnir brádliga síggja politiska trupulleikan, blanda seg uppí og útseta uppsagnirnar. Slík mannagongd kann ikki góðtakast. Tað ber ikki til bara at skumpa trupulleikarnar fram, sigur Kristian Magnussen.

# Góðtaka ikki framferðina



Vísandi til tíðindir í fjølmiðlunum í gjár og í dag um ætlaðar broytingar og harav uppsagnir á Landssjúkrahúsinum, fer felagið at gera vart við, at vit als ikki kunnu góðtaka hesa framferð, sum beinleiðis er í stríð við § 2 í sáttmála okkara við Fíggjarmálastýrið, við tað at hvørki álitisfólk ella starvsfólk hava fingið boð og innlit í hetta í góðari tíð og heldur ikki hava verið við ráðleggingini og tilrættaleggingini av arbeiðinum.

Tað bæði undrar og ikki minni órógvar okkum, at almennar stovnsleiðslur framvegis halda áfram at ganga uttan um sáttmálaásetingar og soleiðis skapa óneyðugt stríð á arbeiðsplássum.

Biðið verður um, at ongi stig verða tikin til nakra broyting ella uppsøgn og at tað arbeiði, sum er farið í gongd verður steðgað, og ikki byrjar fyrrenn ásetingarnar í § 2 í sáttmálanum eru uppfyltar.

**Vinarliga f.v.**
**Gunnleivur Dalsgarð,**
**formaður**

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUT.
Skrás.:13-07-95
Km.: 76.000
Prísur: 158.600,-
Garanti*
Sýnaður 15-10-98

TOYOTA CARINA 1,6 GL
Skrás.: 01-11-89
Km.: 154.000
Prísur: 49.600,-
Sýnaður 14-10-98

TOYOTA CAMRY 2,2 XL
Skrás.: 21-12-91
Km.: 80.000
Prísur: 98.600,-

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
Skrás.: 30-01-96
Km.: 47.000
Prísur: 79.600,-
Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 AUT. GEAR
Skrás.: 24-06-92
Km.: 72.000
Prísur: 89.600,-
Garanti*

HONDA CIVIC 1,5 H/B
Skrás.: 01-08-98
Km.: 26.000
Prísur: 119.600,-
Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 L/B TERRA
Skrás.: 27-02-98
Km.: 30.000
Prísur: 120.600,-

FORD FIESTA 1,3
Skrás.: 16-12-97
Km.: 19.000
Prísur: 79.600,-
Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 12-02-96
Km.: 16.000
Prísur: 97.600,-
Garanti*

NISSAN MAXIMA 3,0 AUT. GEAR
Skrás.: 15-12-87
Km.: 135.000
Prísur: 69.600,-
Sýnaður 01-12.99

SERTILBOÐ
KIA CLARUS 1,8 SEDAN
Skrás.: 16.04.98
Km.: 13.000
Prísur: 98.600,- Garanti*
-í besta standi!!

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820